# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Sjúk ættarbond

Anne Birkefeldt Ragde, *Berlinaraspirnar*
Týtt: Jákup í Skemmini, Nýlendi, 2007

Norska metsølubókin *Berlinaraspirnar,* ið skúgvaði Dan Brown av fyrsta plássi, er nú komin á føroyskum.

Skaldsøgan *Berlinaraspirnar* eftir Anne B. Ragde kundi eins væl itið Arvasyndin. Hetta er søgan um tríggjar brøður. Margido er gamal drongur, miðskeiðis í fimmtiárunum og hevur eina gravarstovu í Tróndheimi. Á fedranna ættargarði uttan fyri býin býr bróðirin, Tóri, saman við gomlu mammu síni, tí forfjónaða og ómælandi pápanum, og øllum svínunum. Í Keypmannahavn býr triði bróðirin, Erlendur, sum er samkyndur dekoratørur og býr saman við danska blaðstjóranum Krumma.

Teir tríggir hittast, tá mamman liggur á deyðastrá. Teir hava ikki borið eyga hvør við annan í óminniligar tíðir. Meðan gamla liggur og stríðist, kemur tað fram, at røturnar, sum brøðurnir hava royndt at kvett, eru djúpari, enn teir grunaðu. Nýggj bond daga fram, sum teir als einki vistu um, og sum frá líður vísir høvundurin síni merkiliga fínu evni til at lýsa ørskuna hjá vanligum fólki. Ein sjarmerandi skaldsøga um sjúk ættarviðurskifti, skitin mannfólk og grísafjós.

Tá ið Berlinaraspirnar kom út í 2004, fekk hon óvanliga góð ummæli, fleiri virðislønir og streyk upp á toppin á metsølulistanum í Noregi, har hon skúgvaði Dan Brown til viks og lá har í 78 vikur, sum er markið fyri, hvussu leingi ein bók kann liggja á tí listanum.



*Norski høvundurin Anne B. Ragde koppaði Dan Brown av norska metsølulistanum*

# On the Road again

*Tað skuldu ganga 50 ár, áðrenn upprunaliga útgávan av klassikaranum »On the Road« kom í bókahandlarnar*




*Við »On the Road« gjørdist Jack Kerouac best kenda røddin hjá sonevnda Beat-ættarliðnum*



**Beatklassikarin *On the Road* kemur nú út í síni upprunaligu útgávu, har burtursensureraðu brotini koma aftur til sín rætt**

## Nýútgáva



**Anna V. Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

Mikudagin 5. september fer onki minni enn ein stórhending fram í altjóða bókmentaheiminum. Halda nógv. Tá eru ikki bara 50 ár liðin, síðani bíblian hjá sonevnda Beat-ættarliðnum, bókin *On the Road,* kom út á fyrsta sinni. Størri týdning hevur tað ivaleyst, at dagurin verður hátíðarhildin, við at teksturin nu kemur út, soleiðis sum høvundurin Jack Kerouac skrivaði hann upprunaliga. Fyri fyrstu ferð fáa lesarar sosatt innlit í brotini, sum forlagið strikaði í útgávuni frá 1957.

### 30 metur rulla

*On the Road* snýr seg í stuttum um teir báðar Sal Paradise og Dean Moriaty, sum drøna USA runt í bili, ávirkaðir av rúsevnum ein stóran part av tíðini. Á vegnum møta teir hópin av løgnum og skeivum lagnum og dyrka sex við í so ungum gentum. Mest týðandi í bókini er tó ævintýrhugurin, kenslan av rótloysi og longsulin eftir tí inniliga, langt burtur frá Amerika í 1950unum við tess borgarligheit og avskeplandi materialistisku virðum. Sum túrurin líður, verður Sal tó meir og meir vónbrotin og ónøgdur við sítt frælsa lív "on the road"

*On the Road* er lutvíst sjálvævisøgulig, og tað sigst, at Kerouac skrivaði hana spontant uppá tríggjar vikur á einum slíkum ørligum biltúri saman við vininum Neal Cassady. Heimafturkomin skrivaði hann tekstin inn á eina 30 metur langa rullu av pappíri. Teksturin bleiv seinni sýndur fram á einum savni í New York, men bleiv ongantíð útgivin. Ikki fyrr enn nú, hann kemur í bókabúðirnar undir heitinum *On the Road – The Original Scroll.*

### Ov vandamikil

Hóast Kerouac skrivaði bókina longu í 1951, kom hon ikki út fyrr enn seks ár seinni. *On the Road* var stutt sagt ov vandamikil moralskt og politiskt fyri Amerika í 1950unum, til at nakað forlag tordi at nerta hana. Tá tað umsíðir eydnaðist vinunum hjá Kerouac at fáa eitt forlag at geva bókina út í 1957, var tað við teirri treyt, at ein røð av sex-brotum vórðu strikað, umframt at allir veruligir persónar fingu onnur nøvn. Og tað er also ta bókina, heimurin hevur kent og virðismett síðani.

Bókin fekk sera góð ummæli, tá hon kom út, og ummælarar tosaðu um, at við *On he Road* hevði Beat-ættarliði fingið sína heilt eyðkendu rødd.

Kerouac sjálvur toldi tó illa nógvu umrøðuna og stóru væntaninar. Hann fór at drekka illa og doyði av rúsdrekkaávum í 1969.

### Brennandi løtur

Fólk eru ymisk á máli um, hvussu



*»On the Road« varð upprunaliga skrivað á eina 30 metur langa pappírsrullu*

stórt skaldsligt virði *On the Road* í grundini hevur. Summi vilja halda, at tað meir er fasinatiónin av Beat-ættarliðnum enn góðskan á bókini, sum hevur hildið lív í umdøminum hjá *On the Road* og Jack Kerouac. Onnur halda seg hinvegin síggja greiðar tráðir í bókini til tankastreymin hjá James Joyce ella síggja hana sum svarið í 20. øld uppá Huckleberry Finn.

Tað verður sagt, at Kerouac ikki átti evnini at skapa eina samanhangandi skaldsøgu, og at tað er ein av trupulleikunum við *On the Road.* Spurningurin er, um tað nakrantíð var hansara ætaln at fortelja samanhangandi søgur. Tað vóru kanska tær, hann leitaði eftir alt sítt stutta lív, men ongantíð fann. Í staðin fann hann logandi intensar løtur, sum hann skrivaði niður á sín ørliga hátt, so tær hava brent seg inn í minni hjá heilum ættarliðum líka síðani.

## Minnir úr Mjørkadali

Georg Sylvest Pedersen,
*Forsvaret i Mjørkadal – som jeg husker det*, 2007

Nýggjársmorgun í ár sløkti stjórin fyri Færøernes Kommando fyri tí seinasta hernarliga radarskíggjanum í Mjørkadali. Harvið var eitt serligt tíðarskeið av – ikki minst fyri tey mongu, sum hava gjørt tænastu í Mjørkadali hesi mongu árini síðani 1962, tá hernaðarstøðin byrjaði sítt virksemi.

Ein av teimum, ið hevur gjøtt drúgvast tænastu í Mjørkadali, er heryvirmaðurin Georg Sylvest Pedersen. Sum eina seinastu heilsan til sítt arbeiðspláss og fólkini har, gav hann herfyri út bókina *Forsvaret i Mjørkadal – som jeg husker det.*

Hóast bókin er rættiliga persónlig í mátanum, høvundurin minnist tíðina í Mjørkadali, er hon eisini eitt áhugavert søguligt dokument. Millum annað lýsir Georg Sylvest Pedersen sera væl, hvussu hermennirnir royndu at gerast partur av føroyska samfelagnum. Eisini gevur hann nógv forkunnug dømi um, hvat føroysku bløðini skrivaðu um støðina, og hvat føroyingar hildu um hetta fremmanda hervaldið í Føroyum í byrjanini.

Á sera væl upplagdan hátt sigur høvundurin frá skemtiligum skálkabrøgdum, ið hermennirnir høvdust at. Kortini gerst frásøgnin ongantíð fjákut, tí hon allatíðina setir hendingarnar í Mjørkadali í áhugaverd politisk og søgulig høpi.

*Forsvaret i Mjørkadal* fæst við at venda sær til erindringer@frk.fo




*Forsvaret i Mjørkadal er eitt forkunnugt søguligt dokument*